**Aksel V. Johannesen**
**løgtingsmaður**

**Nr. 73/2019**

**Fyrispurningur eftir tingskipanini § 52 a**

**Fyrispurningur viðvíkjandi endurgjaldi til fyritøkur og feløg, settur landsstýrismanninum í vinnu- og umhvørvismálum Helga Abrahamsen (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)**

1. Hvussu ber tað til, at vegleiðingin hjá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum ísv. endurgjald til fyritøkur, orsakað av korona, sigur, at tað verður ikki latin stuðul minni enn 6.000 kr. um mánaðin, tá Løgtingið samtykti broytingaruppskotið um at strika minstamarkið?
2. Er tað rætt skilt, at landsstýrismaðurin metir, at áhugafeløg við v-tali, sum hava mist ella koma at missa munandi inntøkur, ikki hava rætt til endurgjald eftir hjálparpakka 2?

**Viðmerkingar:**
Hjálparpakki 2 varð samtyktur í Løgtinginum 6. apríl. Landsstýrismaðurin í vinnumálum vildi áseta eitt minstamark fyri, hvussu høgar tær føstu útreiðslurnar hjá eini fyritøku skuldu vera fyri at fáa endurgjald fyri mistar inntøkur orsakað av korona. Talan var um eitt minstamark á kr. 6000. Fleiri tinglimir, eisini undirritaði, vildu hava hetta markið strikað, so smáar fyritøkur og feløg kring landið eisini verða loftað av hjálparpakkanum. Fleiri áhugafeløg hava lágar inntøkur og lágar útreiðslur, men verða hart rakt nú, tá ið inntøkurnar eru mistar, men útreiðslurnar framvegis skulu rindast. Ikki minst fyritøkurnar og feløgini úti um landið, har føstu útreiðslurnar eitt nú til hølisleigu eru munandi lægri enn í høvuðsstaðarøkinum. Harafturat tykist tað ógreitt í lógini, hvussu ein fyritøka verður allýst, um talan bara er um vinnuligar fyritøkur ella um áhugafeløg, sum hava eitt v-tal, eisini eru fevnd av hjálparpakkanum.

Tað er undrunarvert, at vegleiðingin hjá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum sigur, at fyritøkur og feløg í minsta lagi skulu hava kr. 6000 í útreiðslum fyri at fáa endurgjald, tá Løgtingið hevur samtykt at strika markið. Tí mugu vit fáa greiðu á, um talan er um ein feil, ella um landsstýrismaðurin hevur valt at hyggja burtur frá tí, sum Løgtingið hevur samtykt.

**Á Løgtingi, 24. apríl 2020**

Aksel V. Johannesen